


Mynd: Holberg Fondene

# Hendan myndin er søgulig

**Jógvan Hugo Gardar**

02.11.2015 - 08:46

Oljan.fo

Tær tíggju størstu sjógætisfyritøkurnar á keypsskálanum í Oslo hava nú eitt virði sum er hægri enn virði á teimum tíggju størstu oljufyritøkunum. Her skal nevnast at tann største oljufyritøkan á Oslo Børs, Statoil, er ikki við í hesum yvirlitinum, ið íløgufelagið Holberg Fondene í Bergen hevur gjørt.

Fyri tveimum árum síðani var marknaðarvirði á teimum tíggju størstu oljufyritøkunum (Statoil undantikið) á Oslo Børs 280 milliardir krónur. Samstundis var virði á teimum tíggju størstu sjógætisfyritøkunum «bara» 50 milliardir krónur. Í dag hava sjógætisfyritøkurnar, eitt marknaðarvirði sum er omanfyri 100 milliardir krónur, og líka virðismiklar sum oljufeløgini. Hvør skuldi trúð tí?, skrivar Holberg Fondene í síni viðmerking sum bleiv send út fríggjadagin.

Statoil er í einum flokki fyri seg, og er einsamalt fýra ferðir so stórt sum tær tíggju oljufyritøkurnar sum eru við í hesi uppgerðini. Fríggjadagin var virði á Statoil 437 milliardir krónur. Størsta sjógætisfyritøkan, Marine Harvest Group, hevði fríggjadagin eitt virði upp á knappar 52 milliardir krónur. Bakkafrost hevði fríggjadagin eitt virði uppá góðar 13 milliardir norskar krónur.

*Í morgun er virði á tíggju teimum størstu sjógætisfyritøkunum hetta:*

1. Marine Harvest, 51,2 milliardir norskar krónur

2. Lersøy Seafood, 16,2 milliardir norskar krónur

3. SalMar, 15,6 milliardir norskar krónur

4. Bakkafrost, 13,3 milliardir norskar krónur

5. Austevoll Seafood, 10,6 milliardir norskar krónur

6. Grieg Seafood, 3,3 milliardir norskar krónur

7. Norway Royal Salmon, 3 milliardir norskar krónur

8. Havfisk, 2,5 milliardir norskar krónur

9. The Scottish Salmon Company, 876 milliónir norskar krónur

10. Akva Group, 876 milliónir norskar krónur

*Í morgun er virði á ellivu teimum størstu oljufyritøkunum hetta:*

1. Statoil, 433 milliardir norskar krónur ***

2. Seadrill, 26,2 milliardir norskar krónur

3. Subsea7, 21,7 milliardir norskar krónur

4. TGS-NOPEC, 17 milliardir norskar krónur

5. Det norske oljeselskap, 10,6 milliardir norskar krónur

6. DNO, 9,2 milliardir norskar krónur

7. Aker Solutions, 9,2 milliardir norskar krónur

8. Ocean Yield, 9,2 milliardir norskar krónur

9. Høegh LNG Holdings, 7,7 milliardir norskar krónur

10. BW LPG, 7,7 milliardir norskar krónur

11. PGS, 7,6 milliardir norskar krónur

***Statoil er ikki við í samanberingini hjá Holberg Fondene.



Mynd: Holberg Fondene